# Allround bilfyritøka

**Síðan bilfyritøkan Bilrøkt flutti í egnar virkisbygningar í Stiðjagøtu í Havn, hevur fyritøkan miðvíst víðkað um sítt virksemi. Nú fer Bilrøkt veruliga út í kappingina um leigubilar**

**BILRADIO Á RÁS2**
*Hósdagin kl. 16.10*

Bilfyritøkan Bilrøkt, sum hevur fimm ár á baki, víðkar alla tíðina um sítt virksemi. Síðan fyritøkan flutti í egnar virkisbygningar í Stiðjagøtu, eru arbeiðsumstøðurnar vorðnar munandi betri og ymiskt virksemi er komið afturat sum t.d. Suvo-rustviðgerð. Nú fer Bilrøkt veruliga út í kappingina um leigubilar við 10 nýggjum Honda Accord, sum er á veg.

Í samrøðu við Bilradio á Rás2 hósdagin sigur stjórin í Bilrøkt, Jákup á Borg, at eitt sum kundarnir hava tikið væl í móti er Gullkortið, sum er ein lutfalsliga nýggj tænasta. Tann sum keypir eitt Gullkort fyri 800 krónur hevur nevnliga atgongd til fleiri av tænastunum hjá Bilrøkt sum t.d. flutningshjálpina, eftirlit av akfarinum (kanna bremsur, útstoyt, perur o.a.) rustviðgerðareftirlit, hjólskift, umvæling av steinsløgum, umframt avsláttur í sambandi við reingerð, rustviðgerð, verkstaðsrokningina, dekk og leigubil.

Bilrøkt er ein allround fyritøka innan bilbranchuna og dekkar sera breitt við t.d. leigubilum til nógv ymisk endamál, sum verða marknaðarførdir undir navninum Car Rental, klárgering av bæði nýggjum og brúktum bilum, Car-cosmetic, ið er polering, reinsan og lakkforsegling av bilum, eisini hava teir sølu av produktum til viðlíkahald og reingerð av bilum, og eina hjálpar- og flutningstænastu við trimum flutningsbilum, umframt at teir eisini hava mekaniskan bilverkstað og dekksølu við nútímans dekk- og balanseringsmaskinum.

**mg**



*Feðgarnir Jákup og Heini á Borg til arbeiðis á skrivstovuni hjá Bilrøkt*

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Jens Eli Albinus á mekaniska verkstaðnum*



*Jens Jón Matras í ferð við at lakkforsegla*




*Sigurbjørn Ragnarsson frá Flutningshjálpini*

# Danskur superbilur í Bella



Ein av mest spennandi bilunum á bilaframsýningini í Bella Sentrinum er danski superbilurin Zenvo ST1. Bilurin er designaður av donsku designarunum Jesper Hermann og Christian Brandt, sum eiga desingfyritøkuna Hermann & Brandt.

Menninir aftanfyri Zenvo Automotive eru Jesper Jensen og Troels Vollertsen, sum báðir hava stóran áhuga í superbilum og rasarabilum. Bilurin hevur V8 motor við 1.104 hestakreftum, koyrir frá 0-100 km/t upp á 3 sekund, og toppferðin er 375 km/t.

**mg**

